# Ferðsluruðulleiki í Eysturoynni

*Hóast nøgdin av kava ikki var tann stóra, sum kom niður týskvøldið og mikunáttina, so var tað ríkiligt til at gera ferðsluna í Eysturoynni til ein stóran ruðulleika. Ein trailaraførari hjá Óla Christian Danielsen í Runavík var heppin, at hann slapp við lívinum, tá trailarin koppaði omanav vegnum, meðan maðurin var í holt við at seta ketur á hann*



*Tað valdaði fullkomin ferðsluruðulleiki í Eysturoynni týsmorgunin. Bilar sløgdir allastaðni og ein sjúkrabilurin sum er í ferð við at sleipa ein buss burtur*

**Myndir: Sveinur Tróndarson**

Sveinur Tróndarson

Ferðslan í Eysturoynni var í undantaksstøðu týskvøldið og í gjáramorgunin.

Kavin, sum ikki verður ruddaður, tí ósemja er millum Landsverkfrøðingin og Føroya Arbeiðarafelag, broyttist fyrst til krapa og síðani til ís, og tað var snøgt sagt ikki koyrandi hjá bilum, sum ikki vóru væl »skøddir«.

Harafturat gjørdi vindurin tað beinleiðis lívshættisligt at ferðast har um vegir.

### Vindur og gler

Fyri eysturoyingar er tað ikki ókent, at nógvur kavi altíð legst við báðar munnarnar á Eysturoyartunnlinum og týsdagurin var einki undantak í so máta.

Higartil hevur kortini borið til at koyra, tí kavaruddararnir hjá landinum hava verið skjótir úti, men soleiðis skuldi so ikki vera hesaferð. Kavaruddararnir hjá Landsverkfrøðinginum liggja í arbeiðsósemju við arbeiðsgevaran og tí verður ikki grivið, sum er.

Og hóast nøgdin av kava, sum fall hesaferð, ikki var tann øgiliga, so hava veðurumstøðurnar annars gjørt tað mest sum ógjørligt at koyra sumstaðni og tað fekk ein lastbilførari frá Óla Christian Danielsem eisini at kenna týskvøldið.

### Mundi ligið undir

Hann var á veg niðan móti Eysturoygartunnlinum, tá hann var noyddur at steðga í krapanum.

Ógjørligt var at halda fram og tí gjørdi bilførarin av at fara út at seta ketur á trailaran.

Og tá var um reppið, at tað kostaði honum lívið.



*Bresturin hevur verið harður, tá hesir báðir bilarnir eru stoyttir saman,*

Umframt kavan var ikki sørt av vindi har um vegir, og frá fyritøkuni hava vit skilt, at hvirlurnar vóru øgiligar.

Tað var eisini ein øgilig hvirla, sum skræddi trailaranum um koll, tí ein slíkur vigar ikki minni enn 17 tons.

Tá trailarin koppaði, var maðurin, sum sagt, í holt við at seta ketur á, og var hann ikki so skjótur á beinunum, so lá hann undir.

– Hann kláraði akkurát at sleppa sær til rýmingar, upp um eitt hegn, tá hann sá at bilurin var á veg niður yvir hann.

Tað var ikki hugsingur um at taka allan trailaran uppaftur týskvøldið, men kortini tóku fólk frá fyritøkuni fremsta partin upp. Restin sleppur so at liggja til veðrið er vorðið betri

### Leið 400 fór sama veg

Týsmorgunin var so aftur um reppið, at tað endaði ruddiliga galið.

Leið 400, sum var á veg úr Fuglafirði til Havnar, fór á glið í hálkuni, og tók í fyrsta umfari í ein trailara, sum stóð í niðara borðið.

Bussførarin kláraði eftir øllum at døma at rætta bussin uppaftur, eftir at hann hevði tikið í trailaran, men stutt eftir skræddi ein hvirla í bussin so ógvusliga, at hann enn einaferð fór á glið.

Og hesaferð bar ikki bøtur. Við gronini fyri gleið bussurin oman av vegnum, har hann steðgaði, beint áðrenn hann fór á rull.

Hart royndu ferðafólkini í bussinum sluppu tíbetur óskalað frá óhappinum, sum illa vildi til hevði havt stórskaða við sær.

### Samanstoytur millum Fjarða

Annars hendi eisini eitt triðja ferðsluóhapp har um vegir.

Týsdagin stóðu tveir bilar millum Fjarða, stutt frá frákoyringini til Funningsfjarðar.

Hvussu óhappið er hent, er ilt at siga, men eftir oljublettinum at døma, ber til at gita, at bilarnir eru komnir ov langt inn á vegin og eru síðani brostnir saman.

Tíbetur stóðst eingin mansskaði av óhappunum, men bilarnir báðir fingu stóran skaða.

Løgreglan í Eysturoynni letur illa at skilinum, sum hevur verið, tí umframt hesi óhappini, hava fleiri smærri verið.

– Men tað er ótrúligt at fólk fer í illa skøddar bilar í slíkum veðrið. Eg beindi fleiri bilar til hús aftur, sum koyrdu á summardekkum, sigur vakthavandi á støðini í Runavík, sum leggur afturat, at nú er vegurin opin aftur.

*Skal ein vera heppin, so var henda løtan ikki illa vald. Lítið vantaði í, áðrenn hann fór runt*







# Radiografar krevja ískoyti

Felagið hjá Radiografum í Føroyum fór gjármorgunin í arbeiðssteðg. Felagið krevur somu lønarhækkan, sum sjúkrasystrarnar

John Johannessen

Tað er í veruleikanum eitt stríð um fakbólkar, ið liggur aftan fyri verkfallið hjá felagnum fyri føroyskar radiografar.

Radiografarnir fóru fyrradagin í 24 tíma langan arbeiðssteðg, tí teir ynskja at fáa løn sína upp á sama støði, sum tað hjá sjúkrasytrunum, ið eisini starvast á røntgendeildunum. Eisini ynskja radiografarnir at fáa setanarpolitikk sín upp á sama støði hjá sjúkrasystrunum.

Felagið hjá radiografunum sigur, at upprunaliga ætlanin við verkfallinum var at fáa hækkað lønina, eins og teirri hjá sjúkrasystrunum. Men nú Sjúkrasytrafelagið hevur meldað út, at tað ikki kann góðtaka, at onnur feløg krevja vunnin rættindi hjá Sjúkrasytrafelagnum, kenna radiografarnir seg eisini noyddar at gera vart við, at teir eru ónøgdir við, at sjúkrasytrar starvast á teirra øki fyri hægri løn, enn radiografarnir fáa.

– Vit undrast yvir, at Sjúkrasystrafelagið metir krøv okkara vera teirra vunnu rættindi. Tey hava nevniliga einki við teirra rættindi at gera, men harfturímóti snýr tað seg um at vinna rættindi, ið svara til okkara útbúgving, sigur Jóna Hentze, forkvinna hjá radiografunum.

Forkvinna í felagnum hjá radiografunum, vísir á, at munurin millum radiografarnir á røntgendeildunum og sjúkrasytrarnar á røntgendeildunum er, at radiografarnir hava eina útbúgving, ið er skraddaraseymað til starvið, meðan sjúkrasystrarnar bert hava tikið stutt skeið um, hvussu tær skulu starvast á røntgendeildini.

Radiografarnar siga trupulleikan hjá sær vera, at tær hava avtalu við Fíggjarmálastýrið um, at tær skulu fylgja sáttmálanum hjá sjúkrasystrunum. Orsøkin til hetta er, at Fíggjarmálastýrið ikki vil samráðast við tey smáu feløgni. Vegna tess hava radiografarnir fylgt grundsáttmálanum hjá sjúkrasytrunum. Men av tí, at yrkini eru ymisk, krevjast ávísir ískoytissátmálar fyri smáu feløgini.

# Neyvan gerandiskostur hjá Arafat og hansara líkum

Ber til hjá løgtingsmonnum at fáa innlit í samskiftið, sum hevur verið millum Føroya Landsstýri og PLO, spyr Jenis av Rana m.a. í fyrispurningi til løgmann

Ólavur í Beiti

Í 8 spurningum vil Jenis av Rana hava at vita frá løgmanni um handilssáttmálan við PLO. Jenis av Rana spyr, um til ber hjá løgtingsmonnum at fáa innlit í samskiftið, sum hevur verið millum Føroya Landsstýri og PLO? Hvørjar metingar gjørdi landsstýrið sær, áðrenn fyrsta stigið varð tikið til at knýta samband við PLO? Hvussu metir Føroya Landsstýri sokallaða PLO statin statsrættarliga? Hvussu umfatandi er samstarv Føroya við PLO vorðið, og hvørjar ætlanir fyriliggja ?

Og Jenis av Rana vil eisini hava at vita, um Føroya Landsstýrið hevur knýtt ella roynt at knýtt samband við onnur ódemokratisk stýri lík PLO? Hevur Føroya Landsstýri ætlanir um handilssambond við onnur illgrunaverd stýri ( t.d. Milosevic o.o )? Nær svaraði Ísrael áheitan landsstýrisins - áðrenn ella aftaná at samband var knýtt millum Føroyar og PLO? Hvør var grundgeving ísraelsmanna fyri manglandi áhuga fyri samvinnu við Føroya Landsstýri?

### Svar Ísraels

Í viðmerkingunum til spurningarnar, sigur Jenis



av Rana, at undir viðgerðini av uttanlandsfrágreiðing løgmans fyrr í vár varð Løgtingið munnliga kunnað um royndir, sum landsstýrið hevði gjørt at fáa í lag handilssáttmálar við ávís onnur lond. Fram kom tá, at m.a. Ísrael og PLO vóru spurd um møguliga áhuga teirra fyri sáttmála, at Ísrael ongan áhuga hevði, meðan PLO fegin vildi hava slíkan.

– Neyvan er tað gerandiskostur hjá Arafat og hansara líkum at fáa slíka áheitan, so áhugi teirra er skiljandi, meðan nærri upplýsingar um svar Ísrael - sum jú longu í nógv ár á bygda- og býráðsstøði hevur havt vinabýarsamstarv við Føroyar - eru ynskiligar.

– Ikki skuldi verið neyðugt at mint landsstýrið á, at vit her viðgera tvær diametralt mótsattar fatanir av mannarættindum, tí meðan Ísrael er millum heimsins fremstu demokratisku tjóðir, so er PLO jú, saman við øllum grannum Íraels, á odda ímóti sjálvt mest eyðsýndu og vanligastu mannarættindum, sigur Jenis av Rana í viðmerkingunum.

# Maersk Air bjóðar bíligar ferðaseðlar

*Stendur tað upp til Maersk Air, sleppa føroyingar at ferðast bíliga millum Føroyar og Danmark hetta fram til 19. juni*

Edvard Joensen



Treytað av góðkenning frá Føroya Landsstýri fer Maersk Air at bjóða føroyingum at flúgva millum Vágar og Kastrup um páskirnar fyri 1.060,- krónur umframt tey avgjøld, sum løgd verða omaná.

Á tíðindafundi á Hotel Hafnia mikudagin segði rutustjórin hjá Maersk Air, Keld Mosgaard Christensen, at felagið fer at seta tvey søluátøk í verk. Eitt sum fer at galda fyri tíðina 14. til 23. apríl, og eitt sum fer at galda frá 28. apríl til 19. juni.

Talan verður um at selja ferðaseðlar á rutuni millum Vágar og Kastrup - ella hinvegin - fyri 1.060,- umframt avgjøld fyri hvønn vaksnan persón, sum ferðast. Avsláttur upp á 50% verður latin børnum í aldrinum 2 til 11 ár. Tó verður ikki møguligt at broyta umbidnan ferðaseðil, eins og tað ikki fer at bera til at fáa goldnan pening aftur. Borðið fangar.

Eisini fer Maersk Air í hesum tíðarskeiðnum at bjóða ferðaseðlar til einahvørja danska provinslufthavn fyri 1.760,- kr. umframt avgjøld. Somu reglur sum fyri ferðing til Kastrup eru eisini galdandi her.

Í tíðarskeiðnum frá 28. apríl til 19, juni - báðir dagar íroknaðir - fer Maersk Air at bjóða ferðaseðlar til Kastrup ella Billund fyri 1.250,- krónur umframt avgjøld fyri hvønn vaksnan persón. Hetta søluátakið verður nevnt »Ferðist tvey og gjaldi fyri ein«. Eisini her verða latin 50% í avslátti fyri børn í aldrinum 2 til 11 ár.

Her verða reglurnar annars, at keypast skal í minsta lagi 7 dagar undan fráferð. Tað fer heldur ikki her at bera til at broyta ferðaseðilin ella at fáa goldnar pengar aftur. Treytað verður eisini, at tann, sum ferðast skal vera burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Og tað skulu í minsta lagi tvey vaksin ferðast saman fyri at fáa hendan avsláttur.

Rutustjórin hjá Maersk Air, Keld Mosgaard Christensen, váttar, at tað er sera stutt skotbrá at koma við einum søluátaki, sum byrjar á summarmála, nú bert tveir dagar undan byrjan. Og hann vónar, at Landsstýrið fer at handla skjótt og játta teimum loyvi at selja føroyingum bíligar ferðaseðlar.

Tað er soleiðis, at allir ferðaseðlaprísir skulu góðkennast av Ferðslumálaráðnum. Umframt at Ferðslumálaráðið sendir teir til Føroya Landsstýri at viðmæla. Hetta er gjørt. Ferðslumálaráðið sendi Landsstýrinum umsóknina frá Maersk Air sama dag, hon var latin Ráðnum. Tí vónar rutustjórin hjá Maersk Air eisini, at Landsstýrið fer at handla skjótt.

Í aðrar mátar er Keld Mosgaard Christensen ikki nøgdur við, at Ferðslumálaráðið skal avgera prísirnar á flogrutunum til Føroya. Tað átti fríi marknaðurin at gjørt, sigur hann. Og hann metir, at tá kundi tað verðið bíligari at ferðast millum londini.

Av tí, at talan er um ferðing millum Føroyar, sum eru uttan fyri ES, og floghavnir í ES, metir Maersk Air, at tað ikki skal vera danska Ferðslumálaráðið, sum skal avgera hetta. Keld Mosgaard Christensen sigur, at teir vilja hava hetta undir Rom Sáttmálan. Og so væntar hann, at tað verður bíligari at ferðast alt árið.


**Størstur í síni stødd – við største dieselmotori – til besta prísin**

**CARNIVAL**

**2.9 Dohc Turbo-Diesel**
**16 V, 126 HK, 5 hurðar**

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"



*Multibilurin til einhvørja loysn*

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

*3 ára garanti/100.000 km. garanti*

Fæst eisini sum vøruvognur



EINANS 187.800,-



EINANS 225.800,-

Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600